


**Nr. 5** ***26. februar 2023*** **83. árg.**

# So ymiskir – og tó!

Í Nýggja Testamenti lesa vit um tveir brøður, Andrias og Pætur. Pætur er tann ásýniligi, sum skarar framúr. Andrias er hin smædni og stillføri. Teir eru eitt gott dømi um, hvussu ymiskir tveir brøður kunnu vera. Andrias varð altíð nevndur sum bróðir Símun Pæturs, og tað man ikki hava verið so stuttligt at skula kennast av teimum, tú ert í familju við. Vit vilja heldur kennast sum tann, ið vit sjálv eru.

Andrias skrivaði einki skrift í Bíbliuni. Heldur ikki trínur hann fram sum hin stóri talarin. Men hvørja ferð, vit hoyra um Andrias, so hoyra vit, at hann førdi onkran til Jesus. Hin fyrsti var egni bróðir hansara, Símun Pætur, sum skuldi fáa ein nógv sjónskari lut, enn Andrias sjálvur fekk. Andrias kom í mangar mátar at standa í skugganum hjá bróður sínum.

Hin næsti, hann leiðir til Jesus, er drongurin við teimum fimm breyðunum og báðum fiskunum, sum gjørdust matur til 5.000.

Triðju ferð er, tá ið nakrir grikkar koma til Filippus, av tí at teir so fegnir vilja sleppa at síggja Jesus. Filippus stendur og ivast, men fær so hjálp frá Andriasi, sum førir teir til Jesus.

Ein setningur, ið heftir seg upp í Andrias, er: „Hann førdi hann til Jesus." Jóh. 1,43. Eg dugi ikki at síggja nakað størri kall enn tað. Tað kann væl vera, at Andrias ikki gjørdi tey størstu avrikini í hesi verð; men hann visti, hvussu hann skuldi leiða menniskju til Jesusar, og her kunnu vit læra av Andriasi og gera sum hann. Hóast hann var fámæltur, var hann altíð fúsur at fara til verka.

*Leif Hansen, „Adventnyt"* – *Effie Campbell* umsetti.

# Kongurin, sum einki legði í profetiið

Afghanski kongurin Zahir Shah gav í 1959 loyvi at byggja eina kirkju í landsins høvduðstaði, Kabul. Hetta loyvi varð givið, av tí at amerikanski forsetin Eisenhower hevði givið einari mosku byggiloyvi í Washington D.C., høvuðsstaðnum í USA.
Kirkjan í Kabul varð vígd í 1970, men longu í 1973 komu afghanskir hermenn inn og fóru undir at bróta múrin kring kirkjuna niður, og guvernørurin í Kabul gav meinigheitini boð um at lata kirkjuna frá sær, tí hon skuldi takast niður. Meinigheitin svaraði, at tað kundu tey ikki, við tað at bygningurin var vígdur til Guds.

Eina kirkju fyri eina mosku, hatta riggaði altso ikki. Men hoyr nú um eitt ávarandi profeti, og hvat ið stendst av tí, tá ið fólk ikki vilja akta.

Ein týskur handilsmaður fór til guvernørin – hann var djarvur, mugu vit siga. Handilsmaðurin segði við hann: „Um tín stjórn nemur við hetta Gudshúsið, fer Gud at reka títt stýri frá.“ Hóast mangar altjóða áheitanir og eisini eina frá tí viðgitna evangelistinum Billy Graham á kongin at steðga niðurbrótingini, helt hon á og varð fullførd 17. juli 1973. Somu nátt varð stjórnin feld við einum kvetti! Landið hevði verið kongsdømi í 227 ár, og nú gjørdist tað eitt tjóðveldi við systkinabarni kongs, Sadar Mohammed Daoud Khan sum forseta. Hann varð sjálvur myrdur í sambandi við eitt kommunistiskt kvett í 1978, og í 1979 kom sovjettiska innrásin.

Harrin letur ikki alt um seg ganga. „Her til og ikki longur,“ sigur Hann. Skriftin lærir okkum, at Gud er søgunnar Gud: „Hann koyrir kongar frá, og hann skipar kongar.“ Dán. 2,21.

*Effie Campbell* umsetti.

# Eingir hálvir sannleikar

Moody segði einaferð frá einum ungum manni, sum kom til hansara ógvuliga tungur í huga.

„Hvat bagir tær?“ spurdi Moody.

„Eg kann ikki trúgva,“ svaraði hann.

„Kanst tú ikki trúgva? Hvørjum er tað, sum tú ikki kanst trúgva?“

„Guds orði.“

„Kanst tú ikki trúgva Guds orði? Trýrt tú als ongum, sum har stendur?"

„Nei, eg kann ikki trúgva."

„Jú, tú kanst," svaraði Moody, „sumt av tí trýrt tú. Lurta nú, so skal eg lesa eitt einstakt vers frá Guds orði."

Moody las úr Jes. 53,6: „Allir vit viltust sum seyðir, hildu hvør sína leið. Trýrt tú tí?"

„Jú, tí trúgvi eg," svaraði hin ungi maðurin. Tað var júst hansara trupulleiki. Hann sá allar syndir sínar fyri sær.

„Har sært tú, tú trýrt altso onkrum úr Guds orði."

„Ja, men tað er ikki nóg mikið," segði hann.

„Tað havi eg heldur ikki sagt," svaraði Moody. „Men vit eru ikki lidnir við hatta versið. Nú lesa vit víðari: Harrin læt koma niður á hann ta skuld, sum lá á okkum øllum. Trýrt tú tí?"

Nei, hasum kundi hann ikki trúgva. Men so segði Moody: „Trýrt tú, tað er meira satt tað, sum Gud sigur í fyrru helvt av einum versi, enn tað sum hann sigur í hinari helvtini?"

Hesin ungi maðurin las tað fleiri ferðir. Og á tann hátt gjørdist hann sannførdur um, at hann hevði líka so góðar grundir at trúgva tí seinna sum hinum fyrra.

„Harrin læt koma niður á hann ta skuld, sum lá á okkum øllum."

Hann trúði, at Jesus doyði fyri okkum. Trúarinnar vegur gevur lív.

*„Kirkeklokken" – Effie Campbell umsetti.*

# Depressiónin hvarv

Í Amerika gera tey allar møguligar royndir og kanningar. Millum annað hava tey roynt at latið fólk við depressión lesa 54. kapittul hjá Jesaja eina ferð um vikuna í eitt ár. Tá vísti tað seg, at depressiónin hvarv.

Hetta kapitlið er eisini serliga gott. Um tú á ungum árum hevur kent teg lítisverda og hevur følt teg svikna og hugstoytta, lurta so: „Óttast ikki, tí at ikki skalt tú verða til skammar; lat ikki háð bíta á tær, tí at skemd skal ikki meira verða tær fyri. Tí at tú skalt gloyma lítisvirði ungdóms tíns og ikki minnast vanvirðing einkjudóms tíns. Tí at hann, sum skapaði teg, er maður tín; navn hans er Harri herliðanna; loysnari tín er Ísraels heilagi, hann, sum nevnist Gud alrar jarðar. Svikin og hugstoytt satst tú – men Harrin kallar teg sína. „Man maður

havna sínum ungdóms drósi?“ ljóðar tað frá Gudi tínum.“ (v. 4–6).

Og víðari lesa vit: „Tí at um so fjøllini vikast og heyggjarnir ridla, skal tó kærleiki mín ikki gretta, sigur Harrin, miskunnari tín. Tú eyma, stormbarda, ugganarleysa! Sí, eg byggi teg upp við smáragdum og laði grundvøll tín av saffirsteinum, geri múrtindar tínar av rubinum og lið tíni av karfunkulsteinum og allan tín borgargarð av dýrum steinum. Tá verða øll børn tíni lærusveinar Harrans og skulu njóta miklan frið.“ (v. 10–13).

Kapittulin endar við hesum lyftinum: „Einki svørð, ið smíðað verður ímóti tær, skal fáa sigur; hvørja tungu, ið talar ímóti tær, skalt tú sakfella. Hetta er lutur tænara Harrans, tað rættlæti, sum teir fáa hjá mær, sigur Harrin.“

*Effie Campbell.*

---

Tú upplivir ikki veking, um tú ikki dugir at síggja, at tær tørvar hana. Tá ið tú hungrar og tystir eftir veking í lívi tínum, tá fer Gud at geva tær hana. Guds løkur er fullur av vatni, og hann streymar enn í dag. Men tað er nú so, at tú drekkur ikki úr løkinum, fyrr enn tú kennir tær tosta.

*e.c.* ums.

---

Okkara heim er í himlunum. Her á jørðini eru vit bara fremmand og pílagrímar. Meðan vit bíða eftir Jesusi, vil hann, at vit skulu arbeiða fyri tí søkini, sum hann gav lív sítt fyri: Heimsins frelsu.

*e.c.* ums.

---

At Jesus reis upp er ein vitnisburður um, at Gud góðtók tað ofrið, sum Jesus gav.

*e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 26. febr. | **Tekstur:** | 4. Mós. 27,18 + 22-23 og Jós,1,1-9 | **Bíbliuorð:** | Jós. 1,5b |
| 5. mars | **Tekstur:** | Matt. 7,24-27 | **Bíbliuorð:** | Matt. 7,24 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74




**Nr. 6** ***12. mars 2023*** **83. árg.**

# Guds undurfulla orð

Á ársmøtinum hjá Kirkjuliga Missiónsfelagnum talaði Hans Erik Nissen, fyrrverandi fyrisøðumaður á Luthersk Missionsforenings Højskole í Hillerød. Hann segði m.a. nakað soleiðis:

Í 2. Tim. 3,16 lesa vit: „Øll skriftin er innblást av Gudi og er nyttulig til lærdóm..." (V.D. ums.) Gud hevur andað á orðið í Bíbliuni, tí kemur Heilagi Andin út úr hvørjum orði, eg lesi í Skriftini, og andar aftur á meg. Hann ger tað livandi fyri mær.

Tí er tað, at nógv kunnu vitna, at tey eru vorðin frelst, uttan at nakar var hjástaddur. Tey lósu í Bíbliuni og fingu hjálp gjøgnum orðið. Í Ápostlasøguni lesa vit um Kornelius. Ein eingil kom til hansara og segði: „Send boð til Joppe og heimta Símun, sum verður kallaður við tilnavninum Pætur; **hann skal tala orð til tín, sum tú skalt verða frelstur við** og alt hús títt." Áps. 11,13–14. Her kemur tað týðiliga fram, at vit verða frelst gjøgnum orðið. Tað, sum orðið sigur, er satt. Tað hevur einki við kenslur at gera. Orðið sigur tað, og so er tað so.

Í hesari verð ridlar alt. Ódnir herja, og sjógvar og flóðaldur bróta. Men eitt er, sum stendur rimmarfast, tí tað er grundfest uppi í Guds himli. Tað er Guds orð. „Um allar ævir, Harri, orð títt er, fast tað stendur á himni." Sálmur 119,89. – „Himin (tann luftin, sum vit síggja) og heimur skulu ganga undir, men orð míni skulu als ikki forganga." Luk. 21,33.

Eg detti ikki av tí smala vegnum, tá ið eg fylli meg við Guds orði og geri eftir tí. „Fest míni fet við orðum tínum," stendur í Sálmi 119,133.

Eitt av Jesu nøvnum er „Guds orð". – „Og hann er klæddur í skikkju, droypt í blóði, og navn hansara kallast: Guds orð."

Opb. 19,13. Guds orð er lig við Jesus. „Í fyrstuni var orðið, og orðið var hjá Gudi, og orðið var Gud.“ Jóh. 1,1.

Ein meinigheit kann vera lítil og veik, men um tey varðveita Guds orð, skulu dyrnar standa opnar, og meinigheitin skal vaksa. „Eg veit um gerningar tínar: Sí, eg havi latið dyr standa opnar fyri tær, sum eingin er mentur at lata aftur, tí at tú hevur lítlan mátt, og kortini hevur tú varðveitt orð mítt og ikki avnoktað navn mítt.“ Opb. 3,8.

Orðið varðveitir okkum eisini í freistingarstundini. „Av tí at tú hevur varðveitt orð mítt um tolmóð, skal eg varðveita teg frá freistingarstundini, sum koma skal yvir allan heimin.“ Opb. 3,10.

Yviri í Noreg vóru eini eldri, trúgvandi hjún, sum vóru sera dámlig. So gjørdist konan sjúk og lá at doyggja. Vinirnir í meinigheitini fóru at vitja hana og siga henni farvæl.

Tá ið teir vóru farnir, sigur konan við prest, sum sat eftir: „Nú hava tey øll sagt við meg, at eg var so fitt og góð. Hasi mannaorðini kann eg ikki brúka til nakað sum helst; men gev tú nú mær eitt orð úr Heilagu Skriftini, eitt orð, sum eg kann hava við mær á ferðini til mítt himmalska heim.“

Tá gav hann henni orðið úr 1. Jóh. 1,7: „Blóð Jesu, sonar hansara, reinsar okkum frá allari synd.“

Hon bað um eitt orð at hava við sær á ferðini, tí Guds orð er brúgvin, sum vit ganga eftir til himmals, og tað orðið ridlar ikki. Tað er trygt og varir í ævir.

*Effie Campbell.*

# Gud skal hava takk fyri alt

*Eivind Berggrav, bispur*

Alt mannfólkið var farið til Lofoten. Heima sótu mamman og tvey tey yngstu børnini, Erling og Sigrid, bæði vóru júst konfirmerað. Tey hjálptu til á garðinum, róðu út til mjólkarbátin hvønn morgun, so at mjólkarspannirnar komu til mjólkarvirkið. Mamman stóð í túninum og sá børnini rógva út ein morgunin. Sjógvurin var gjálvutur, men tey dugdu væl at stýra og høvdu gott áralag. Tey lyftu spannirnar upp. Mjólkarbáturin fór duffandi avstað. Bæði børnini vóru á heimleið. Tá við eitt kom eitt brot, báturin bleiv blakaður runt – og var burturi. Har stóð mamman. Eingin annar bátur var inni, eingir grannar at hjálpa. Mjólkarbáturin var ov langt burturi. Dugir nakar

at máta kvølina og pínuna hesi sekundini? Tann, sum hoyrdi um henda sorgarleikin, mátti rópa: „Gud, hvar vart tú, hvussu **kundi** tú lata hetta henda?“ – Máttloysi tyngdi meg til jarðar. Hvør orkaði at fara til hennara? Tað var okkurt í mær, sum stúrdi fyri ákæruni móti Gudi. Hvussu bera í bøtuflaka fyri, hvussu greiða frá tí, hvussu fyrigeva hetta?

Seinni vóru tey funnin. Frammi í kóri í kirkjuni stóðu tvær hvítar kistur. Beint við sat mamman. Við píndum sinni fór eg yvir til hennara, líka sum at biðja um fyrigeving. Men hon fór á føtur og kom ímóti mær við eygum, sum lýstu, hóast tey vóru táravát. Hon segði: „Gud fekk Erling og Sigrid. **Hann veit**, hvat ið er best fyri okkum. Gud skal hava takk fyri alt.“

Mamma Erling og Sigrid hevur talað sterkari til mín enn flest øll onnur. Hon var hin sterka, har sum vit vóru um at søkka.

*Úr „Spenningens land“. – Effie Campbell* umsetti.

# Hvat skulu børn tíni einaferð fáa í arv frá tær?

Eini sethús við stórum urtagarði uttanum, eina bankabók við einum stórum tali í, ein stápil av tryggum og álítandi virðisbrøvum, fínt innbúgv, dýrar málningar, ella – tá ið útreiðslurnar fyri jarðarferðina eru tiknar burturav – bara nakrar fáar krónur, sum tú ár undan ári hevur spart saman.

**Tað er ov lítið!** Eina góða uppaling, góðar vanar, sparsemi, dugnaskap, kærleika til sannleikan, trúfesti. **Tað er ov lítið!** Alt hatta kann vera gott, men tað er ov lítið. Tí hvat hevur hatta, tá ið samanum kemur, at týða í ævinleikanum? Hugsa tær, um tú kundi givið børnum tínum minnið um ein pápa, sum gekk í kirkju og til altars – um eina mammu, sum kendi bønarinnar veg til Guds trónu, og sum ágrýtin gekk hesa leið – eitt heim, har tit ið hvussu er einaferð um dagin savnaðust um Guds orð og loyvdu tí at treingja inn í hjørtuni, og síðani merkt av tí, fóru út í gerandisdagin.

Hugsa tær, um tú kundi givið børnum tínum eitt heim, har tit ikki byrjaðu dagin ella gingu til og frá borðinum sum dýrini í fjósinum, har tit høvdu annað at práta um við døgurðaborðið enn ta seinastu gølusøguna í býnum, tann nýggja filmin í biohøllini, bingokvøldið og annað tílíkt.

Tað hevði verið ein arvur, sum hevði týdning fyri ævinleikan, og minni enn tað kunnu børn tíni ikki lata sær lynda at arva eftir teg. Tí alt hitt er bara smáting sammett við tað, sjálvt um tað so vóru milliónaupphæddir, tú kundi latið tey fingið í arv. Hugsa um tað, tá ið tú sparir fyri at kunna geva børnum tínum nakrar krónur í arv, ella tá ið tú gevur teimum eina dýra útbúgving: Hvat kostar hetta, sæð í ævinleikans ljósi?

Livandi kristnitrúgv kanst tú ikki geva teimum í arv, tí hon kann ikki arvast. Men tú kanst ganga undan við einum góðum fyridømi og geva teimum „uppskriftina" í arv: Høgtíðssiðirnar, altargongdina, bønirnar, húsandaktirnar, og so biðja, at Gud sjálvur í sínum tíma má fáa slíkt vald á børnum tínum, at hann má fáa loyvi at fylla „uppskriftina" og vanan, so tað verður til lív og frelsu fyri tey, so at tey ikki einaferð skulu ákæra teg og siga: „Jú, pápi og mamma vóru góð nokk. Tey góvu okkum eina góða uppaling, og vit arvaðu eina fitta peningaupphædd; men viðvíkjandi lívinum saman við Gudi, fingu vit onga hjálp frá teimum, so her fingu vit ongan arv."

*Et Ord med på Vejen – Effie Campbell* umsetti.

---

Tað, sum vit fylla okkum við dagliga, kemur at ávirka okkara hug og hjarta. Vit kunnu ikki liva eitt dupult lív, har vit viðhvørt liva saman við Jesusi og aðrar tíðir liva, sum okkum lystir. Bíblian er greið. Vit kunnu ikki tæna tveimum harrum.

*e.c.* ums.

---

Lívið gongur bara uppeftir hjá teimum trúgvandi. Jú eldri tú verður, jú betri blívur tað. Kennir tú Gud? Tú mást blíva kend við hann. Lat Gud fáa eftirlit og umsjón við lívi tínum.

*e.c. ums.*

---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 12. mars | **Tekstur:** | Luk. 15,4-7 | **Bíbliuorð:** | Jóh. 10,11 |
| 19. mars | **Tekstur:** | Matt. 22,1-14 | **Bíbliuorð:** | Matt. 22,4 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74